Løgtingslóg um serstakar fiskidagar til bólk 5 B fyri fiskiárið 2026

Umboðið fyri Føroya Fiskimannafelag hevur hesa viðmerking til uppskot um serstakar dagar til bólk 5B.

Síðan vinnan, havstovan, manningarfeløg og mynduleikar annars komu ásamt um eina umsitingaætlan í 2019, hevur tað opna marknaðir, sum kravdu, at vit høvdu eina MSC-góðkenning. Her verður serliga hugsa um hýsu til bretska marknaðin, og upsa til Fraklands og Týskland.

Tí kunnu vit, sum hava ábyrgd av fiskimonnum ikki taka undir við, at ein ávísur bólkur í fiskidagaskipanini fær fleiri dagar. Vit umboða fiskimenn, sum hava yrki á sjónum, sum livibreyð. Teirra lívsgrundarlag er sum heild hótt. Longu nú eru fleiri línuskip í bólki 3 løgd; Skørin, Kvikk og nú Polarstjørnan. Hesar manningar eru uppsagdar og mugu finna eitt annað arbeiði. Hetta hendir, tí at fiskidagarnir eru skerdir seinastu árini.

Vit kunnu ikki góðtaka, at MSC-góðkenningin verður sett uppá spæl, uttan at tað sæst aftur í øktum døgum til bólk 3, uppá 15%. Bólkur 3 er ongin hóttan móti okkara fiskastovnum, teir fiska við stórum húkum, og hava sera lítið av ungfiski.

Tað hevur í nógv ár verið sera lág inntøka hjá bólki 2, sum fiskar upsa fyri tað mesta. Men árið 2025 var sera gott, og er ein rættuliga stórur partur av virðinum kemur frá hægri fiskiprísi. Hetta kann koma teimum, sum hava sít livibreyð í bólki 2 aftur um brekku. Teir kunnu missa sítt livibreyð, tí at teir eru ikki við í roknistykkinum.

3 skip í bólki 3 eru løgd seinastu árini. Longur aftur í tíðina eru fleiri onnur skip løgd. Hvat ætlar Landsstýrimaðurin at gera við tað? Hava hesir menn onki virði? Tað vænti eg ikki Landsstýrimaðurin heldur. Tí kunnu vit vóna, at Landsstýrimaðurin hevur eina loysn fyri hesi 3 skipini eisini, so tey kunnu sleppa út aftur.

Øll skipanin má takast upp til nýggja viðgerð, um summir bólkar fáa serligar dagar, tá ið fiskidagar mangla í. Hetta má gerast, áðrenn 5B fær serligar eyka dagar.

Jan Højgaard

Føroya Fiskimannafelag